## Dugnaskapsroyndin, várið 2002



*Fríggjadagin fingu kvøldskúlanæmingar hjá Tórshavnar Kvøld- og Ungdómsskúla dugnaskapsprógv í sigling. Myndamaðurin hjá Sosialinum var ein túr framvið og fekk mynd av teimum. Kartni Páll Sólbjørn Fornagarð, Brian Jakob Bjartur í Dali, Jóannes Dan Eidesgaard, Einar Venned, Jens Petur Jensen, Jákup Poulsen, Ragnar Justinussen, Heini Harryson, Ólavur Groth, Bárður Johannesen, Torbjørn Jacobsen og Kristian Petersen. Kjartan Signar Petersen vantar á myndini.*

*Mynd: Jens Kristian*

## Neyvan Karibia

**Millum próvtakararnar fríggjadagin var eisini Jóannes Eidesgaard, sum flest øll munnu kenna. Eisini hann hevur stóran áhuga í sigling og báti, og sigur hann, at grundin til, at hann tók dugnaskapsroyndina er av berum áhuga**

BÁTALÍV
*Ingrid Bjarnastein*

– Nei, eg komi neyvan so langt sum til Karibia, segði Jóannes Eidesgaard, tá Sosialurin tosaði við hann mánamorgunin. – Hetta er bara reinur áhugi. Mær hevur altíð dámað væl at fjasast við bát, og eg eigi eisini bát sjálvur. Og hetta prógvið gevur mær jú loyvi at føra skip upp til 100 tons á heimasjógvi.

Jóannes Eidesgaard sigur, at hetta var ein møguleiki, sum hann valdi at taka av, tí hann hevur stóran áhuga í fakinum. Áðrenn politisku karrieruna var Jóannes lærari, og tá hann hevði verið lærari í 10 ár, tók hann farloyvi í 2 ár fyri at sleppa til skips, og eisini var hann til skips, hvørja summarfrítíð.

– Hetta er absolutt ikki valflesk, sigur Jóannes Eidesgaard flennandi. – Men tað er væl ikki nakað afturstig fyri ein politikkara at hava innlit í ymisk mál, tí tað gevur jú grundarlag fyri betri politikki. Politikkur er jú alt, og júst sum aðrir eru áhugaðir í haga, veðrum og landbúnaði, so eri eg áhugaður í bátum og tí, sum hartil hoyrir.

Hvat dugnaskapsroyndin verður brúkt til, dugir Jóannes ikki at siga. Men í fyrsta umfarið letur hann Karibia fáa frið.



*Jóannes Eidesgaard fekk saman 12 øðrum dugnaskapsprógv fríggjadagin*

*Mynd: Jens Kristian*

# Fyrst dugnaskapsroynd, so Karibia




*Eftir ætlan fara Ólavur Groth og báturin Annika til Karibia komandi ár. Ólavur fekk fríggjadagin prógv fyri at hava tikið dugnaskapsroynd í sigling*

*Mynd: Jens Kristian*

**Ólavur Groth hevur júst tikið dugnaskapsroynd í sigling, og nú hevur hann ætlanir um at fara suður til Karibia at sigla í nakrar mánaðar**

SIGLING
*Ingrid Bjarnastein*

Søldfirðingurin, Ólavur Groth, hevur verið áhugaður í sigling í fleiri ár. Í vetur hevur hann gingið á sjómansskúlanum tvær ferðir um vikuna, og fríggjadagin fekk hann prógv fyri alt stríðið. Frálæra hevur verið í sjóreglum, siglingarlæru, skipstøkni og skipstólum. Eisini hevur verið undirvíst í týðan av veðurkortum.

– Eg havi keypt mær ein bát, sum er ein gamal fiskibátur, og nú geri eg hann um til ein frítíðarbát, sigur Ólavur Groth, sum dagliga er byggimeistari, og fæst í løtuni mest við at umvæla gomul hús.

– Ætlanin við hesum er so at fara ein longri túr. Allarhelst verður tað til Karibia í nakrar mánaðar. Eg ætli at sigla framvið skotsku strondini, hollendsku strondini, niður framvið Portugal og so enda í Karibia.

Dugnaskapsroyndin er nú komin til hølvdar, so nú vantar bert at rigga bátin til, soleiðis, at hann verður egnaður til túrin. Men hesin túrurin verður neyvan í ár, tí enn manglar rættiliga nógv til báturin veðrur klárur.

### Síggja verðina

Dugnaskapsroyndin gevur Ólavi møguleika at síggja verðina.

– Eg havi leingi havt áhuga í at sigla. Næst seinasta ár var eg fleiri túrar við Norðlýsinum, eg havi siglt við seglum í Danmark og eg havi faktiskt altíð verið spentur uppá, at gjørt ein slíkan túr. Eisini havi eg siglt við fiski- og fraktbátum í trý ár.

Sjálvur hevur Ólavur onga familju her í Føroyum, sum bindur hann. Hann hevur eina dóttir í Danmark, so hann heldur hetta er ein gyltur møguleiki at sleppa at síggja verðina.

– Arbeiðið hjá mær verður lagt soleiðis til ræ当ttis, at eg sleppi at verða burtur í nakrar mánaðar, greiðir Ólavur frá. – Men tað er ikki vist, at túrurin verður um summarið. Tað er nú soleiðis, at veðrið til at sigla í Karibia er best í november mánaða, tí tað liggur vindurin undan.

Ætlanin er eisini at seta segl uppá bátin, so øll náttúrlig orka verður brúkt á bestan hátt.

Báturin hjá Ólavi eitur Annika eftir dóttrini hjá fyrrverandi eigaranum. Men tey vera ikki tveyeini tá lagt verður til brots. Helst verða eini tveir mans við.



# Heimasíðan hjá Javnstøðunevndini aftur dagførd




*Heimasíðan hjá Javnstøðunevndini verður dagførd hvørja viku til valið. – Hesa vikuna við trimum nýggjum áhugaverdum greinum eftir Turið D. Hentze, Hera Kragesteen og Helenu Dam á Neystabø*

**Nýtt tilfar er nú lagt á heimasíðuna hjá Javnstøðunevndini www.javnratt.fo**

JAVNSTØÐA

Sigast kann ikki annað enn, at nýggja heimasíðan hjá Javnstøðunevndini verður væl vitjað. Í seinastu viku vóru 2128 vitjanir. Eisini nógv hava brúkt møguleikan at atkvøða. 246 fólk hava greitt atkvøðu og svarað uppá, um kvinnur skulu hava fleiri tingsessir. 74% svaraðu ja, 20% nei og 6% svaraðu ‘veit ikki’.

### Úr nýggja tilfarinum

Forkvinnan í Javnstøðunevndini Turið Debes Hentze sigur m.a. í grein, sum ber heitið ‘Kynsbrillur’, at: “Hví verður tað mett sum ov jánkasligt at brenna fyri umsorgan av børnum, gomlum og veikum, tá vit í dag síggja politikkarar kropp á kroppi vilja tekkast júst hesum. Kanska júst eitt tekin um, at tey sum veruliga brenna fyri hesum forsømda øki, ikki hava verið nóg væl umboðað á tingi. Hetta átti at verið kvinnuligum valevnunum til fyrimunar. Politikkur er jú raðfestingar framum alt.”

Heri Kragesteen, sálarfrøðingur, skrivar um at ynskja og tora broytingar. Hví eru ikki fleiri kvinnur uppi í politikki? Hann sigur m.a.: »Á sama hátt er tað, vit hugsa og halda í politikki, meiri stýrt av tryggleikatørvi enn politiskum argumentum og skynsemi ella dirvi. Tað er ikki tilvildarligt at børn, tá tey fáa valrætt, í nógv flestu førum velja sum foreldrini, ið hava valt sum teirra foreldur. Tað er ikki siðvenja, og slættis ikki hjá okkum, at kvinnur eru høvuðsleikarar í politiskum og øðrum almennum talvi um makt og ávirkan. Hvørki innan ella uttan tinggátt. Og tað eru bæði menn og kvinnur í høvuðsheitinum samd um, menn møguliga meira samdir enn kvinnur.«

Í aðrari áhugaverdari grein gevur Helena D. á Neystabø, tingkvinna, nýggjum tinglimum góð ráð og greiður frá arbeiðsháttinum í tinginum. Hon sigur m.a. soleiðis: »Undir yvirskriftini »Ljóshærd konufólk« stóðu m.a hesar reglur at lesa í einum av føroysku bløðunum beint eftir Løgtingsvalið í november 1990. Tað vil siga dagin eftir, at eg varð vald í Løgtingið fyri fyrstu ferð. Eg hevði ongantíð stillað upp til eitt løgtingsval fyrr, so henda verðin var nýggj fyri meg.

Aðrastaðni í sama blaði stóð – eisini um meg –, at »Eftirsum útsjónd er alt og innihald einki« og víðari »Einum kom til hugs ævintýrið um Skønheden og udyret, tá ið nývalda tingkvinna hjá Fínaflokki tók sæti ...«

Tað var slíkan orðadrátt, ið eg nú sum ein part av løgtingsarbeiðinum skuldi brynja meg út at luttaka í. Eg hugsaði, at slíka vælkomuheilsan hevði ein nývaldur ljóshærdur maður helst ikki fingið.«

Spurningurin í 5 á netinum hesa vikuna er:

Hvat kann gerast betur, um fleiri kvinnur koma á Ting?

Her verður m.a. sagt: »Koma fleiri kvinnur á Løgting vilja tær avgerðir, sum tiknar verða gerast betri fyri øll. Kvinnur og menn hava ofta ymiska áskoðan, tí kynini gjøgnum uppaling og mentan hava fingið ymiskt virðisgrundarlag. Fleiri kvinnur á tingi, hevði tryggjað, at hædd varð tikin fyri fleiri viðurskiftum, av tí at bæði kvinnur og menn høvdu luttikið í avgerðartilgongdini.« Eisini verður sagt, at »Mannfólk og konufólk eru skapt ólík bæði kropsliga og av lyndi. Tey síggja tingini úr ymiskum sjónarhornum og tí skuldi tað givið eina meir fjøltáttaða fatan av veruleikanum, tá bæði kynini arbeiða saman.

Atkvøðugreiðslan hesa vikuna fer at snúgva seg um, hvørt vit hava brúk fyri einari javnstøðulóg ella ikki.

Um tú vilt vita meir, kanst tú venda tær til samskiparan: Anniku W. Joensen, annikaw@post.olivant.fo, tlf. 212848.




REPRO-Z 319540